# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# EITT LIBERALT ALTERNATIV

Tað er eitt sera áhugavert projekt, sum Poul Michelsen er farin undir. *»Lat okkum røra í grýtuni«*, sigur maðurin, sum til seinasta løgtingsval varð valdur á fólkaflokslistanum við 341 persónligum atkvøðum.

Poul Michelsen hevur verið í leikum fyrr, hann sat á tingi í farna valskeiði sum varamaður, men hann hevur verið valdur á ting fyrr, í 1988, og hann stjórnaði Havnini sum sera vælumtóktur borgarstjóri í 12 ár eftir kommunuvalið í 1980.

Poul Michelsen er misnøgdur við politikkin hjá Fólkaflokkinum – serliga við viljan hjá leiðsluni at liva upp til síni egnu ideali.

Vit hava fyrr sæð nýggjar flokkar bjóða seg fram. Men vit hava ikki upplivað tað síðani menn úr Sjálvstýrinum og Vinnuflokkinum fóru upp í Fólkaflokkin í 1940, at tingfólk fara úr einum flokki fyri at stovna ein annan. Hóast Miðflokkurin er nýggjur, so hevur hann sínar røtur í Kristiliga Fólkaflokkinum og harvið eisini í gamla Framburðsflokkinum hjá Kjartan Mohr. Verkamannafylkingin var í so máta ein politisk døgnfluga. Her vóru tað misnøgd fólk sum fylktust, og tá samanhaldið er misnøgd, so er ikki nóg at byggja uppá, og tí hvarv hesin flokkur sum døgg fyri sól.

Men spennandi verður at síggja, hvussu Poul Michelsen fer at klára tað. Hann skal, saman við hinum valevnunum, skava flokkinum einar túsund atkvøður, fyri at náa sperrumarkið.

Talan er um ein liberalan flokk. Ein flokk, sum hava at tey liberalu virðini í nógv størri mun sleppa at virka í búskapinum, hann tosar um persónligt frælsi, burðardygd á øllum økjum, at vit skulu gerast partur av alheimssamfelagnum, um at menna skúlaverk og fáa fleiri hægri útbúgvingar hendavegin.

Flokkurin nevnir einki um fullveldi sum fremsta mál, og Poul Michelsen hevur eisini sagt, at tað málið ikki skal forða hinum. Soleiðis er helst talan um ein flokk, sum skal føra tann politikkin, sum Fólkaflokkurin sigur seg føra men ikki megnar at føra. Meðan Fólkaflokkurin er gyrdur



í brøkur av fólkum, sum taka persónlig atlit og persónligar relatiónir fram um liberal atlit – ein konservativur flokkur, sum á summum økjum nærmast er kommunistiskur, so skal nýggi flokkurin vera ein beinleiðis liberalur flokkur.

Og pláss er fyri slíkum flokki, tí vit hava ongan rættiligan liberalan flokk frammanundan. Poul Michelsen er treiskur, bæði sum politikari, vinnulívsmaður og ítróttarmaður. Hetta projektið hjá honum skal tí takast í fullum álvara. Tað er sjálvandi avgerandi, hvørji fólk Poul Michelsen fær afturat sær – men vit loyva okkum at gita, at flokkurin fær trygga umboðan á tingi og verður ein stór hóttan móti Fólkaflokkinum.

## Framsókn kann saktans vinna sær sæti á tingi



## Rúna og Heðin eru longu farin

Tað at fólk venda sær frá flokkum, sum tey hava verið trúgv, er ikki nakað nýtt – og heldur ikki so sjáldsamt. Vit hava fleiri dømi:

Helena Dam á Neystabø, Heðin Mortensen, Kristian Magnussen, Óli Jacobsen, Karsten Hansen, Finnbogi Arge eru dømi um fólk, sum hava umboðað minst tveir flokkar á tingi. Fólk úr ymsum flokkum. Men nú tá Fólkaflokkurin er í kykaranum, so er áhugavert at varpa ljós á fólk, sum nýliga eru farin úr flokkinum.

Sjálvstýrisflokkurin hevur mangan verið kallaður »kittflokkurin« – speirekandi, tí hann kann brúkast í øllum samgongum, og har eru allar meiningar vælkomnar. Flokkurin kann brúka bæði »brúkt« javnaðarfólk og »brúkt« fólkafloksfólk. Tvey fólk, sum nýliga eru farin úr F'olkaflokkinum, eru Rúna Sivertsen og Heðin D. Poulsen.

Rúna Sivertsen hevur umboðað Fólkaflokkin á tingi í seks ár sum varafólk fyri Anfinn Kallsberg. Heðin D. Poulsen hevur eisini verið íðin fólkafloksmaður, tó at hann ongantíð kom í fremstu røð.

Tey bæði eru tí potentiellir kandidatar til fara upp í Framsókn, flokkin hjá Poul Michelsen. Tey hava ongan kjans í Gamla Sjálvstýrinum, tí nýggi formaðurin hevur tikið um stýrisvølin. Hann verður kanska ikki einsamallur, men fær valla meira enn ein aftur at sær. Gamla Sjálvstýri skal nokk klára seg, men als einki bendir á, at flokkurin fer at vaksa. Hann hevur staðið í stað síðani 1940, so har er eingin vón í so máta.

# Hvør fer við Poul?

Tað er einki at ivast í, at Fólkaflokkurin er tann mest hótti flokkurin, nú Poul Michelsen fer at stovna nýggjan flokk. Onkur hevur tosað um »Target Fólkaflokkurin« – at Poul Michelsen skal vísa ráðandi monnunum í Fólkaflokkinum, at hann er tann sterki, sum veruliga kann hótta Fólkaflokkin.

Hesum vísir Poul Michelsen sum vera man aftur. Men um hann vil tað ella ikki, so er vandin stórur fyri einum svíðandi ósigri hjá Fólkaflokkinum.

Javnaðarflokkurin fekk ein ordans avsmurning í 1994, tá Verkamannafylkingin, sum fyri ein stóran part varð mannað við fólki, sum vóru misnøgd við Javnaðarflokkin og tí fegin sóu, at Javnaðarflokkurin fór at líða ein knúsandi ósigur. So var, flokkurin fór í knús, og nú 17 ár seinni hevur flokkurin ikki vunnið tað mista innaftur.

Tað er tí ikki løgið, um Jørgen Niclasen og hansara menn rista í brókunum. Á Rás2 í gjár segði Jørgen Niclasen, at tað var broytingin við einum valdømi, sum gjørdi, at Poul Michelsen hevði brúk fyri at markera seg. Hvør skal siga, har var einki innrømmilsi um, at Fólkaflokkurin kanska svíkur liberalu idealini. Ella ger hann nú tað?

Fleiri fólkafloksfólk hava verið »mistonkt« fyri at ætla sær at fara við Poul: Ein er Rodmundur Nielsen, sum tó hevur svorið Fólkaflokkinum trúskapareið á landsfundi. Hann er í løtuni varatingmaður fyri Óla Breckmann, varatingmann, sum ikki hevur havt sæti síðani 1. desember í fjør. Ein annar er Heðin Zachariassen, sum eisini er varatingmaður fyri Fólkaflokkin. Ein triðja, sum hevur verið nevnd, er sera dugnaligi politikarin og stjørnuskotið hjá Fólkaflokkinum, Annika Olsen.

Hvussu leikur fer, fáa vit at síggja. Hetta eru bara leysasøgur og gitingar. Men tað er ikki óhugsandi at ímynda sær, at onkur annar – enn Poul Michelsen – er misnøgd/ur við liberala profilin hjá Fólkaflokkinum. Og eitt er vist, at tey, sum fara við Poul, tey fara frá onkrum øðrum. Tí tað sum Poul fær, tað missir onkur annar. Og Poul fær fólk, tað er vist. Hjá okkum á síðulinjuni er hetta eitt spennandi projekt - og fyri fólkaræðið Føroyar er tað sera áhugavert, um »dunnuhylurin« kann víðkast við einum konstruktivum og seriøsum íkasti, sum kann spyrjast burturúr. Livst so spyrsts...





## Bøtir Salt alt?

BJARNI DJURHOLM
KJAK Á SÍÐU 10



## Eghom-innrás á Egholm

TÍÐINDI
SÍÐA 4

**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*